## Ágóða av arbeiðsloysi

Seinastu trý árini er talið á arbeiðsleysum dønum minkað umleið 60.000, og tað sæst nú aftur í tølunum hjá ríkiskassanum, at so nógv færri skulu hava almennan stuðul at liva av, samstundis sum ríkiskassin fær tilsvarandi meiri inn í skatti. Sambært Politiken hevur minkandi arbeiðsloysið givið ríkiskassanum einar 15 mia. krónur hesi árini og av tí 11 mia. krónur í fjør. Tá er tann økta inntøkan av meirivirðisgjaldi ikki tald uppí.

## Feilir í lønarseðlum

Ein kanning hjá danska fakfelagnum FOA hevur avdúkað, at nógvir feilir kunnu vera í lønarseðlunum, sum fólk fáa frá sínum arbeiðsgevarum. Av teimum 1.650 seðlunum, sum felagið kannaði, vóru 13 prosent skeivir. Í einum føri hevði ein pedagokur fingið næstan 70.000 krónur ov lítið í løn og pensjón. FOA sigur, at teir flestu feilirnir standast av, at teir einstøku arbeiðsgevararnir kenna ikki lønarsáttmálarnar nóg væl.

Føroyska átakið í Íslandi:

# Vónir og skepsis í bá

**– Í Føroyum hava vit sett spurnartekin við ymiskt í fríhandilssáttmálanum, men á ferðini í Íslandi fingu vit eisini at vita, at eins væl og vit eru skeptist – eitt nú um íslendskar íløgur í Føroyum, eru íslendingar eisini skeptiskir um føroyskar íløgur í Íslandi. Eftir vitjanina stendur kortini eftir, at í báðum londunum seta fólk stórar vónir til fríhandilssáttmálan millum Føroyar og Ísland, sigur Steinbjørn í Dali, sum var við fyri Menningstovuna**

FØROYSKT ÁTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Menningarstovan – ella Vinnuframastovnurin, sum saman við løgmansskrivstovuni og vinnumálaráðnum, ið skipaðu fyri føroysku vitjanini í Íslandi í døgunum, 31. januar til 2. februar.

Vitjanin var í tveimum pørtum

Løgmaður, Jóannes Eidesgaard, var boðin til Íslands á almenna vitjan, og við hetta høvi varð eisini skipað fyri einum føroyskum vinnuligum átaki í Íslandi, har 20 føroyskar vinnufyritøkur vóru umboðaðar.

Samlaða luttakaratalið úr Føroyum var umleið seksti.

Føroyska ferðalagið fór til Íslands við leiguflogfari og kom heimaftur við regluligu flogrutuni úr Íslandi – í báðum førum við flogførum hjá Atlantic Airways.

### Tveir partar

Steinbjørn í Dali, sum starvast á Menningarstovuni, og sum eisini var við í Íslandi sigur, at føroyska átakið í Íslandi var skipað í tveimum pørtum, soleiðis at løgmaður við fylgi høvdu sína skrá har yviri – og vinnuligi parturin sína. Í øðrum førum varð skipað soleiðis fyri, at løgmaður var við til tey tiltøk, sum høvdu við vinnuliga partin at gera.

Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, var eisini við í ferðalagnum í Íslandi, og hann hevði eisini sínar vitjanir og sínar fundir, eins og hann náttúrliga eisini var við til tiltøk, sum høvdu við vinnuliga partin at gera.

– Hósdagin 1. februar varð skipað fyri seminari í tónleikasalinum í Reykjavík, har nakrir fyrilestrar vórðu hildnir. Av føroysku luttakarunum helt Tróndur Djurhuus, stjóri í FT-International hjá Føroya Tele, ein fyrilestur um, hvussu hann sær møguleikarnar í fríhandilssáttmálanum millum Føroyar og Ísland. Bæði løgmaður og íslendski forsætisráðharrin, Geir H. Haarde, vóru við á seminarinum.

Steinbjørn sigur, at íslendingar fingu eisini høvi at siga sína hugsan um, hvørjar møguleikar teir síggja í sáttmálanum.

– Annars varð mest tosað frá "livrini" á hesum seminari, sum eisini var sera áhugavert, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at eigarin av Bónus-handlunum í Føroyum eisini helt ein fyrilestur, har hann eitt eitt nú tosaði um tær undarligu forðingar, sum hava verið í samhandlinum og viðurskiftunum millum londini. Hann tosaði um, hvørjir møguleikar liggja í nýggja sáttmálanum – bæði fyri íslendskar vørur í Føroyum og føroyskar vørur í Íslandi.



Steinbjørn sigur, at ein íslendingur, sum býr á norðurlandinum og sum eigur part í virksemi í Føroyum, eitt nú í føroyskum línuskipum, tosaði um tær royndir hann hevur av at gera íløgur í Føroyum – og av føroyingum, sum samstarvsparti.

Eini 100 fólk, bæði føroyingar og íslendingar, vóru við á seminarinum.

### Góður stuðul

– Eftir seminarið, var høvi hjá føroyskum og íslendskum fyritøkum at hitta hvørja aðra í einum øðrum sali í bygninginum, og her kundu umboðini sita og práta tvørtur um borðini um møguligt samstarv. Eg hevði varhugan av, at prátið millum føroyingar og íslendingar gekk væl, og at partarnir høvdu nógv upp á hjarta.

Steinbjørn sigur, at Menningarstovan longu undan føroyska átakinum í Íslandi hevði fingið góða hjálp frá íslendska Útflutningsráðnum.

– Íslendskar fyritøkur kundu tekna seg til seminarið á teirra heimasíðu, og eisini bar til hjá íslendskum fyritøkum at fáa samband við føroyskar fyritøkur og gera avtalur um fundir. Soleiðis vóru eisini fleiri fundir avtalaðir, áðrenn føroyska ferðalagið yvirhøvur kom til Íslands.

Hann heldur, at íslendska Útflutningsráðið gjørdi eitt dygdargott arbeiði fyri at marknaðarføra føroyska átakið.

– Eitt annað tiltak, sum eydnaðist sera væl, var morgunmaturin um morguninn fríggjadagin 2. februar, sum vit fóru heimaftur beint eftir døgurða hendan dagin. Her høvdu føroysku fyritøkurnar møguleikan at bjóða sínum samstarvspørtum í Íslandi til góðan og vælreiddan føroyskan morgunmat, sum føroyskur SvF-kokkur stóð fyri. Á matarskránni var alt føroyskur matur, eisini turrur fiskur, turr grind, spik og skerpikjøt aftur við føroyskum øli og vatni.

Steinbjørn sigur, at rættiliga nógv fólk var til hendan morgunmatin, helst eini 300-400 í tali.

– Hetta tiltakið hevði tískil ógvuliga stóra undirtøku og eydnaðist sera væl, leggur hann aftrat.

Føroyska ferðalagið búði á Hotel Nordica í Reykjavík, og her búðu fólk væl.

### Aðrar vitjanir

Umframt fundarvirksemið